# Eivindur livi

Fyri sjey árum síðani fór Eivindur í Gongini ein feriutúr til India, men gloymdi alt um, at hann hevði ein ferðaseðil heimaftur.
- Eg hevði stutt sagt funni alt tað, eg so leingi hevði leitað eftir - onki annað hevði týdning beint tá, sigur Eivindur, sum síðani hevur livað sum hindu. Men Eivindur biður framvegis Faðirvár



SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Vit eru uppi á loftinum í Smiðjuni í Lítluvík. Eivindur í Gongini er í ferð við at taka nakrar málningar niður av veggunum og seta teir til viks. Seinastu dagarnar hava fólk havt høvi at síggja rættiliga sermerktu og óvanliga litføgru málningar hjá Eivindur her í Smiðjuni. Og tað er eisini orsøkin til, at tvær smáar skálir, ein banan og ein kokosnøt liggja á gólvinum í einum horni.

- Har offri eg til gudarnar og brenni roykilsi og myrra. Tað reinsar luftina og opnar sinnið hjá teimum, sum koma at hyggja. Vónandi hevur tað hjálpt, tí mínar myndur eru jú so nógv øðrvísi, enn tað, fólk vanliga síggja í Føroyum.

### Øðrvísi

Eivindur er sannførdur um, at tað er lyndið í okkum, sum ger av, hvat vit síggja. Eftir hansara tykki eru føroyingar sera daprir í sinninum, í mun til eysturlendingar, og tí mála so nógvir føroyingar tungar og myrkar málningar.

- Tað sigur seg sjálvt, at tað er trupult hjá einum tungum sinni at vera opið fyri sovorðnum liteksplosiónum, sum mínir málningar eru. Teir krevja, at tú brúkar allar tínar sansir, men føroyingar hava lyndi til at ganga við einum tungum loki á sínum kenslum. Teir skulu eisini allatíðina ansa eftir ikki at traðka við síðuna av, tí í Føroyum er tað so øgiliga lítið pláss fyri teimum sum eru øðrvísi, sigur Eivindur, sum veit, hvat hann tosar um. Sjálvur hevur hann altíð verið annarleiðis, og fólk í býnum tóku tí frástøðu frá honum.

- Slíkt hendir ikki, tí fólk eru ónd, men tí tey eru bangin fyri tí ókenda. Fólk kendu ikki sannleikan um meg, tí tey gittu í staðin fyri at spyrja. Hvør eg veruliga eri sum persónur, fingu tey ikki at vita, fyrr enn einaferð eg fekk møguleika at vera við í sendingini "Tilvera" hjá Armgarð Arge. Eg valdi at vera so erligur, sum gjørligt, og síðani tað havi eg onki merkt til, at fólk hyggja skeivt at mær. Tey halda meg uttan iva framvegis vera løgnan, men tey hava góðtikið meg, sum eg eri. Og nú elski eg at koma heim aftur til Føroyar at vitja, sigur Eivindur, sum seinastu sjey árini hevur havt bústað í Goa landslutinum í India.

### Spardi børnini

Eivindur hevur altíð verið hugtikin av India og serliga Hinduismuni. Longu sum 14 ára gamal sat hann og granskaði bøkur um eysturlondini og teirra religiónir, og var rættiliga bergtikin av allari hippierørsluni og The Beatles, sum javnan ferðaðust til India at leita sær ráð og vegleiðing frá sínum guruum.

- Sjálvt um eg inniliga ynskti sjálvur at sleppa til India, bleiv tað ongantíð til nakað tá. Uttan iva hekk tað saman við øllum ræðusøgunum, man hoyrdi um rúsevni og hvussu nógv komu illa fyri av hesum ferðunum í India. So mínir Indiadreymar vórðu verandi í hugaheiminum, og eg varð verandi í Føroyum.

Eivindur gjødist í staðin blómudekoratørur og fekk seinni trý børn við eini føroyaskari kvinnu. Sum frá leið treivst Eivindur tó hvørki í parlagnum ella á arbeiðsplássinum. Hann flutti tí til Danmarkar, har hann tók eina listarlig útbúgving og undirvísti í at mála. Hann royndi at halda sambandið við børnini heima í Føroyum við líka, men tað gekst illa, tí hann og fyrrverandi dáman høvdu ilt við at tosa saman. Árini gingu, Eivindur gjørdist abbi, men sum tíðin gekk, píndi tað hann meir og meir, at hann ikki slapp at vera meir fyri síni abbabørn, og at tey øll ikki kundu hava størri gleði av hvørjum øðrum.

- Tað eina árið kom eg so við tí hugskoti, at vit øll hildu jól saman. Tíverri høvdu eg og fyrrverandi dáman framvegis ilt við at semjast. Tí gjørdi eg heldur av at sleppa mær langt burtur fyri at spara abbabørnini fyri at skula velja, hvønn tey skuldu halda jól saman við. So eg fór inn á eina ferðaskrivstovu, og bað tey senda meg so langt burtur, sum til bar. Tað eina staðið, tey nevndu, var Goa í India. Dagin eftir sat eg í flogfarinum á veg til India við einum returferðaseðli, og skuldi eftir ætlan heimaftur tríggjar vikur seinni.

### Fekk fýra børn

Komin til Goa, kom Eivindur í samband við ein álvarsliga sjúkan mann, sum bjóðaði honum at búgva hjá sær. Eivindur tók av, tí hann vildi fegin hjálpa manninum og fekk samstundis møguleika at uppliva tað "sanna" India. Hann hjálpti hjúnunum við at dyrka lítla jarðarstykkið, tey høvdu, og skjótt gjørdist Eivindur ein partur av familjuni. Tí var tað nátúrligt og í tráð við hinduistiskan sið, at Eivindur fekk ábyrgdina av teimum fýra børnunum, tá maðurin doyði av sjúkuni og kona hansara eisini doyði stutt eftir.

- Eg ivaðist ikki í, at hetta var mín lagna, mítt Karma, sum hinduar kallað tað. Eg var jú farin heiminífrá, tí eg ikki slapp at vera saman við mínum abbabørnum, og innast inni var tað jú framvegis teimum, eg leitaði eftir. Tí mátti tað sjálvsagt vera ein meining í, at eg nú hevði fingið ábyrgdina av fýra indiskum børnum, sum høvdu brúk fyri mær.

Eivindur varð tí verandi í India. Ferðaseðilin heimaftur